# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað er skeivt at billa sær inn, at stríðið í Kenya er um eitt valúrslit. Tað er breiðari og djúpari enn so*
*(Kofi Annan)*




*Tað vóru tey svørtu, sum góvu Barrack Obama sigurin í South Carolina*

# Hann hølvaði Hillary av

**Barrack Obama fekk heili 55 prosent av atkvøðunum í South Carolina. Men tað vóru tey svørtu, sum gjørdu munin, og tað er ikki nóg mikið aðrastaðni**

- Hetta forsetavalið snýr seg ikki um landspartar, átrúnað ella kyn. Tað snýr seg heldur ikki um rík ímóti fátækum, gomul ímóti ungum ella um svørt ímóti hvítum. Tað snýr seg um fortíðina ímóti framtíðini, segði Barrack Obama, tá hann takkaði fyri stórsigurin í South Carolina leygardagin.

Politiskir eygleiðarar siga, at Barrack Obama mátti vinna í South Carolina, har meiri enn helmingurin av fólkinum eru svørt. Hillary Clinton gjørdi alt fyri at fáa fatur á teimum svørtu veljarunum, og upp undir valdagin var Bill í South Carolina og hjálpti henni. Men hóast fyrrverandi forsetin er væl umtóktur millum tey svørtu í USA, fekk Hillary bara 18 prosent av atkvøðunum hjá teimum svørtu veljarunum.

Valið í South Carolina vísti, at Barrack Obama er valevnið hjá teimum svørtu amerikanarunum, men tað vísti eisini, at hann hevur ikki nóg gott tak á teimum hvítu, og tað kann fáa avgerandi ávirkan á tað endaliga úrslitið, siga teir politisku eygleiðararnir. Í South Carolina atkvøddu 36 prosent av teimum hvítu fyri Hillary Clinton, og heldur færri atkvøddu fyri John Edwards og Barrack Obama. Hinvegin kann Obama fegnast um, at hann fekk atkvøðurnar frá teimum flestu ungu, sum vóru á vali.

Eygleiðarar siga, at kappingin um uppstillingina hjá demokratunum er líka opin nú, sum áðrenn hon byrjaði, og tað er heldur ikki vist, at tann stóri valdagurin 5. februar fer at geva nakað endaligt úrslit.

### Javnt í Florida

Í morgin hava republikanararnir uppstillingarval í Florida, og tær seinastu meiningakanningarnar benda á, at tað verður ein sera javnur dystur ímillum senatorin John McCain og fyrrverandi Massachusetts-guvernørin Mitt Romney. Kanningarnar siga, at teir báðir fáa 30 prosent av atkvøðunum í part.

Mike Huckabee fær 14 prosent, og fyrrverandi New York-borgarstjórin Rudy Giuliani, sum hevur rikið valstríð í Florida leingi, fær sambært kanningunum 13 prosent. Tað kann hava við sær, at hann gevst.

Politisku eygleiðararnir siga, at endar valið í Florida nøkunlunda javn millum McCain og Romney, er tað líka torført at siga nakað um tað endaliga úrslitið hjá republikanarunum sum hjá demokratunum.

# Fylgisveinur fer at raka Jørðina

**Amerikanararnir hava mist ræðið á einum njósnarafylgisveini, sum fer at detta niður á Jørðina um ein góðan mánað**

- Myndugleikarnir halda eyga við støðuni. Nógvir fyrisveinar eru farnir av kós og dotnir niður á Jørðina uttan at gera skaða, og vit eru í ferð við at kanna, hvussu vit kunnu forða fyri, ay hesin ger stórvegis skaða, sigur talsmaðurin hjá amerikanska trygdarráðnum, Gordon Johndroe, við AP.

Sambært tíðindastovuni var tað ikki ætlanin, at almenningurin skuldi frætta um fyrisveinin, sum hevur mist sína megi, og sum amerikanska eftirlitið hevur mist tamarhaldið á. Nú hava embætismenn í umsitingini váttað, at tíðindini eru sonn.

Gordon Johndroe ásannar fyri AP, at amerikanska eftirlitið hevur einki ræði á fylgisveininum, og at tað er vónleyst at siga, hvar hann fer at detta niður. Hinvegin tykist greitt, at hann fer at detta niður um mánaðarskiftið februar-mars.

Tann best kendi tilburðurin av hesum slagnum var í 1979, tá tann 78 tons tunga rúmdarstøðin Skylab fór av kós og datt niður í Indiska Havið og eitt óbygt øki har vesturi í Avstralia. Ta ferðina hendi eingin skaði.



*Um ein góðan mánað dettur amerikanski fylgisveinurin niður onkunstaðni á Jørðini (Mynd: AP)*

## STUTT SAGT

### Eingin Kasyanov

Valnevndin í Russlandi kunngjørdi í gjár, at Mikhail Kasyanov sleppur ikki at stilla upp á forsetavalinum, sum verður í mars. Nevndin sigur í grundgevingunum, at kanningar hava avdúkað, at 13 prosent av nøvnunum á stillarunum hjá Kasyanov eru følsk, og at uppstillingin tí ikki kann góðtakast. Russisk lóg sigur, at forsetavalevni skulu hava minst tvær milliónir undirskriftir. Tær hevði Kasyanov, men sambært valnevndini vóru 13 prosent falskar. Politiskir eygleiðarar í Moskva siga, at Mikhail Kasyanov er ein av fremstu mótstøðumonnunum hjá Vladimir Putin, forseta.

### Gjørdu mistøk í Rwanda

Franski uttanríkisráðharrin, Bernard Kouchner, viðgekk í gjár, at Frakland mistók seg í sambandi við hópdrápið í Rwanda í 1994, men hann vildi ikki viðganga, at Frakland hevði nekra hernaðarliga ábyrgd av í, sum hendi. Umleið 800.000 fólk lótu lív í hópdrápinum á vári í 1994, og rwandiskir og franskir myndugleikar hava síðani keglast um, hvør hevði skyldina av tí, sum hendi. Rwandiska stjórnin heldur uppá, at Frakland átti sín part av skyldini, men á einum tíðindafundi í rwandiska høvuðsstaðnum Kigali í gjár segði Bernard Kouchner, at táverandi franska stjórnin skilti ikki álvaran, fyrr enn tað var ov seint.

### Fischer var giftur

Kanadiski løgfrøðingurin og blaðmaðurin John Bosnitch heldur uppá, at talvsnillingurin Bobby Fischer, sum doyði herfyri, var giftur. Bosnitch, sum var sakførari hjá Bobby Fischer í 1995, og sum fekk hann leysan í einum fongsli í Japan, sigur, at Fischer var giftur við japonsku Miyoko Watai. Løgfrøðingurin sigur við Daily Telegraph, at hann var hjástaddur, og at hann skrivaði undir sum vitni, tá tey bæði giftust. Spurningurin um fortíðina hjá Fischer er komin fram, nú ognin skal gerast upp. Sambært íslendskum miðlum átti Fischer í hvussu er einar 20 mió. krónur í einum banka í Sveis.